# Arkitekturur skal lekkja á framtíðar sjúkrahúsum



Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn er bygt eftir gamlari fyrimynd. Nú verða onnur stig tikin í nýggju sjúkrahúsunum, sum byggjast skulu komandi árini. Alt skal verða til gagns fyri viðgerðina

**Hereftir skulu nýggj sjúkrahús í Danmark byggjast eftir teirri meginreglu, at tær fysisku umstøðurnar skulu hava týdning fyri lekingina**

SJÚKRAHÚS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Danmark:** Burtur við neonljósunum. Burtur við stovum har fleiri sengur eru inni. Burtur við teirri hvítmálaðu gongini.

Men – inn við dagsljósi, frískari luft, náttúrumyndum á veggunum og tónleiki á ljóðteppi.

Nú danir skulu byggja fimm super-sjúkrahús fyri 40 mia krónur tey komandi mongu árini, verða tey bygd eftir einum lekjandi arkitekturi.

Soleiðis ljóða boðini frá einum bólki av framstandandi arkitektum og læknum, sum hava brúkt eitt ár at koma við einum umfatandi tjakuppleggi um, hvussu sjúkrahús skulu síggja út í framtíðini.

– Tað er ikki longur bert neyðugt at taka hensyn til funksjónir, reinføri og flutningsmøguleikar. Estetiskt umhvørvi hava eisini stóra ávirkan á heilsuna hjá tí sjúka og vælveruna hjá starvsfólkunum, sigur Lars Heslet, professari og dr. med., sum er ein av monnunum handan verkætlanina.

## Ikki stress

Í dag er støðan hon, at "lekjandi arkitekturur" er eitt hugtak sum er vorðið alt meiri og meiri útbreitt seinastu 10 árini.

Haraftrat vísa kanningar hjá vísindafólkum í m.a. USA, at tað er samband millum innrætning av sjúkrahúsum og møguleikarnar hjá sjúklingunum at koma fyri seg aftur.

Granskingin vísir, at ein innrætting við friði, frískari luft, dagsljósi og góðum plássi ger sítt til at sjúkradagarnir fækka, minni vandi fyri at geva skeivan heilivág og færri óhapp av fólki sum detta.

Samstundis við hetta bøtir innrættingin um arbeiðsumhvørvið og gevur størri nøgdsemi millum brúkarar og starvsfólk.

– Tá tú kemur inn í forhøllina á einum sjúkrahúsi í dag, fært tú beinanvegin eitt negativt huglag. Arkitekturin gevur tær beinanvegin eina kenslu av stressi og ógleði. Vánaligar sjúkrahúsbyggingar økja talið av infeksjónum, sjúklingarnir liggja longur, teir gerast dapurtskygdir og illsintir, og har er eitt vánaligt arbeiðsumhvørvi. Skal tann negativi spiralurin broytast, mugu vit sleppa undan tí teknologiska sjúkrahúsinum og ístaðin byggja sansalig sjúkrahús, sigur Lars Heslet.

## Vinna tað aftur

Politikkararnir hava tikið væl ímóti nýggju hugsanini um sjúkrahúsini.

Ein teirra er Ulla Astman, ið er forkvinna í Danske Regioners Sundhedsudvalg. Í Kristeligt Dagblad heilsar hon nýggju ætlanini vælkomnari:

– Hetta er ein týðandi partur í planleggingini fyri tey nýggju sjúkrahúsini, tí vit vita, at ljós, luft, útsýni og litaval hava stóran týdning fyri innleggingina og vælveruna hjá tí sjúka – eisini fyri starvsfólkið.

– Fíggjarstøðan skapar sjálvandi sínar avmarkingar, men vit vilja fara so langt sum tilber, tí vit vita, at ein kann forvinna tað aftur við færri seingjardøgum og færri sjúkradøgum hjá starvsfólkunum.

Byggingin av nýggja universitetssjúkrahúsinum í Århus er longu byrjað, og her hevur ein roynt at fylgja teirri nýggjastu granskingini innan arkitektur og innrætting. Ein byggir her m.a. einastovur við dagsljósi, góðum luftskifti, akustikki og plássi. Og ein væntar at hetta fer at síggjast positivt aftur í rakstrarútreiðslunum.

– Arkitekturur er í mínum høvdi ikki bert ein spurningur um úttrykk ella útsjónd, men eisini um disponering, plasering og innrætting. Og fíggjarliga er hetta heldur ikki kostnaðarmiklari enn vanlig bygging.

– Tað eru gjørdar nógvar kanningar sum vísa, at um ein ger skilagóðar íløgur at byrja við, so forvinna tær seg innaftur, sigur Claus Thomsen, læknastjóri í Århus.


## Havstovan søkir eftir maskinmeistara



**Søkt verður eftir einum maskinmeistara til Magnus Heinason at byrja 1. mars 2010.**

**Lýsing av Magnus Heinason**
R/S Magnus Heinason
Tórshavn, TN 407, OW 2252,
bygdur í Tomrefjord, Noreg í 1978

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Klassi: DNV*1A1, ICE-C

Longd (LOA): 44,50 m
Breidd: 9,52 m
Djúpd: 7,15 m

BRT: 669
Høvuðsmotorur: 1800 HK M.A.K.
Ravmagn: 3x380/220 V AC.
2xMTU, 288 KVA, 1500 rpm.

Útgerð:
Botn- og flótitrol
Ekkolodd, EK-500
Asdic
Plankton net
CTD við rosettu, fluorometri og ADCP
GPS og DGPS
Arpa-radara
Satelittsamband

**Førleikakrøv**
- *Mininum vinnubræv sum maskinistur á 1. stigi*
- *Heilsuprógv*
- *Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð*
- *Roykkavari*
- *Góðan røkjuskap*
- *Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva*

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Havstovan**
**Nóatún 1**
**P.O. Box 3051**
**FO-110 Tórshavn**

og skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 25. januar 2010.

Nærri upplýsingar um starvið kann fáast við at venda sær til Erling í Liða, reiðara, á tlf. 35 39 00 ella e-post: erlingl@hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo